# Páskaunduríð

# Jesu uppreisn

*Kjartan Stakksund*

Men eftir hvíludagin, tá ið tók at lýsa av fyrsta degi í vikuni, komu Maria Magdalena og hin Maria út at hyggja eftir grøvini. Og sí, tá varð landskjálvti mikil, tí at eingil Harrans kom niður av himli og steig fram og velti steinin frá og setti seg á hann. Men útsjón hansara var sum snarljós, og klæði hansara hvít sum fonn. Men vaktarmenninir skulvu av ræðslu fyri honum og vórðu sum deyðir. Men eingilin tók til máls og segði við kvinnurnar: »Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita. Hann er ikki her, tí at hann er risin upp, sum hann hevur sagt. Komið higar og síggið staðin, har sum Harrin lá! Og skundið tykkum og farið og sigið lærusveinum hansara: »Hann er risin upp frá deyðum; og sí, hann fer undan tykkum til Galileu; har skulu tit síggja hann«. »Sí, eg havi sagt tykkum tað«. Og tær fóru í skundi burtur frá grøvini við ótta og miklari gleði, og tær runnu at bera lærusveinum hansara boð um hetta. Og sí, Jesus kom ímóti teimum og segði: »Heilar og sælar!« Men tær fóru til hansara og fevndu um føtur hansara og tilbóðu hann. Tá segði Jesus við tær: »Tit mega ikki ræðast! Farið og boðið brøðrum mínum, at teir skulu fara avstað til Galileu, og har skulu teir síggja meg«. Matt. 28, 1-10.

Nú páskirnar aftur standa fyri durðunum og vit aftur skulu hoyra tann sigursæla boðskap sum ber okkum boð um at lívið hevur sigrað á deyðanum, at deyðin ikki longur er eitt punktum, men at hann er byrjanin til eitt ævigt lív heima hjá Gudi; hetta lívið kann ein og hvør ogna sær við trúgv á Jesusar fullgjørda verk á Golgata.

Tað er jú tað, sum vit hava hoyrt um í føstuni, hvussu Jesus var viðfarin fyri okkara skuld, har hann til síðst var hongdur upp á krossin á Golgata, negldur gjøgnum hendur og føtur fyri at keypa okkum leys frá ævigari glatan.

Hettar var prísurin sum Gud mátti gjalda fyri okkum, eitt dýrt loysigjald kunnu vit siga; men Gud havi lov fyri at Jesus ikki var liggjandi í grøvini, nei, hann sprongdi deyðans leinkjur, hann er sigurshetjan frá Golgata, hann steig út úr grøvini páskamorgun okkum til æviga rættvísti.

Tí kunnu vit av røttum siga hvør við annan, gleðiligar páskir í Jesu navni, eg vil hervið enda við einum páskasálmi sum eg havi yrkt til páskirnar 2006.

## Páskasálmur

Lag: Gakk undir Jesu krossat stá.
Bf. 64, Dk 438 Gfs 5

*1. Við Golgata eg friðin fann,
har blóð Guds sonar niður rann;
tað burtur mínar syndir tvóð,
hans náði móti mær er góð.*

*2. Tað svárt var har á Golgata,
tí øll mín synd á Jesus lá;
hann negldur var á krossins træ,
og fyri fíggindum hann bað.*

*3. Tín pínsla, deyði fyri meg,
er bjarging mín á smala veg;
tí prísi eg hans navn í her,
sum frelsti meg í óndu verð.*

*4. O, Jesus góði, lær meg sjá,
teg hangandi á Golgata;
í grøvina tú lagdur var,
tí at tú mínar syndir bar.*

*5. Úr grøvini tú tó upp stóð,
tá runnið hevði alt títt blóð;
Sum hvørja sál her tváað kann,
tú sigur yvir deyða vann.*

*6. Mín vón í dag er sigur tín,
tí ert tú Jesus frelsa mín;
tú lekti míni syndasár,
í míni sál er ævigt vár.*

**Kjartan Stakksund**

# Miðlahúsið í apríl




Miðlahúsið 12. apríl kl. 19:

## Met um bestu fløguna í Miðlahúsinum

Mikukvøldið klokkan 19 verður konsert í Miðlahúsinum við monnunum handan bestu fløgurnar í 2005. Deja Vu átti við fløguni A Place To Stand On, sambært lesarum hjá Dimmalætting bestu fløgu í 2005, meðan fløgan Morning Dew hjá Høgna Lisberg vann sama heiður á Planet Awards.

Høgni Lisberg fer at framføra løg av Morning Dew. Deja Vu fer somuleiðis at spæla nakað av A Place To Stand On, so her verður møguleiki at meta um sjálvur hvørji løg hava munin. Ella bara njóta tónleikin, ið ferðast innan inniligan popp.

Konsertin er í samband við, at fleiri føroyskir bólkar fara til Reykjavíkar í næstu viku, at hava konsertir fyri íslendingum. Hetta er eitt sokallað AME-Reykjavík (Atlantic Music Event) tiltak, sum Menningarstovan, Tutl og Norðurlandahúsið skipa fyri í felag.

Endamálið við ferðini er at skapa áhuga fyri føroyskum tónleiki í Íslandi. Høgni Lisberg og Deja Vu eru við í hópinum, sum fer til Íslands, og konsertin í Miðlahúsinum er tískil ein lítil upphiting fyri teir báðar bólkarnar, og eitt kærkomið høvi hjá føroyingur at smakka nakað av tí, ið íslendingar fáa borðreitt.

Konsertin byrjar kl. 19 og er til umleið 21.30. Kostnaður er 100 kr. Hósdagurin er frídagur, so vónandi verða nógv andlit at síggja í Miðlahúsinum mikukvøldið.

Miðlahúsið 17. apríl kl. 20:

## Martin Joensen Band í Miðlahúsinum í Vágsbotni

2. páskadag kl. 20 verður forvitnislig cafékonsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tað er bólkurin Martin Joensen Band, sum eftir vetrarstøðg aftur letur hoyra frá sær. Á konsertini verður m.a. at hoyra nýggjari tilfar, sum bólkurin í løtuni er við at innspæla í Jakzac Studio. Trivið verður sjálvandi eisini at teir meira kendu sangirnar hjá Martini Joensen.

Bólkurin hevur verið rættuliga virkin seinastu trý árini, og hevur m.a. luttikið á teimum báðum seinastu G!festivalunum umframt á MJÚS 2005, og ikki kann sigast annað, enn at skoðsmálini hava verið góð.

Teir, ið mynda bólkin eru: Pauli Magnussen, bass, Eyðun Hansen, guitar, Jónleif Jensen, trummur, Jákup Zachariassen, guitar/steelguitar og Martin Joensen, sang og guitar.

Tilfarið, ið bólkurin hevur á skránni, er alt skrivað av Martini Joensen og lagt til rættis av bólkinum í felag.

Miðlahúsið 15. apríl kl. 14:

## Føroyingar læra til flogskiparar

Fleiri og fleiri føroyngar ynskjast at gerast flogskiparar. Danska fyritøkan Karlog hevur útbúgvið fleiri føroyingar til flogskiparar og fer leiðslan á fundi í Miðlahúsinum 15. apríl kl. 14 at greiða frá møguleikunum hjá føroyingum at útbúgva seg til flogskipara á rutuflogførum. Fyritøkan stendur fyri allari útbúgvingini frá tí at næmingurin sær eitt flogfar fyri fyrstu ferð til hann er klárur til at fara til arbeiðis í einum størri flogfelag.

Miðlahúsið 20. apr. kl. 19:

## Blaðtekning og fólkaræði

Í sambandi við at tað sunnudagin 22. apríl kl. 15 letur upp stór framsýning í Norðurlandahúsinum við blaðtekningum hjá 9 norðurlendskum blaðteknarum, teirra millum okkara egna Óla Petersen verður pallborðsfundur í Miðlahúsinum hóskvøldið 20. apríl kl. 19, har m.a. kendir danskir blaðteknarar, ein íslendskur og ein norskur blaðteknari luttaka. Í døgunum frá 18. til 21. apríl hava blaðteknararnir verkstovu/workshop í Miðlahúsinum.

Miðlahúsið 22. apríl kl. 15:

## Marner á Lofti um ísraelar og palestinar



Ísraelsfelagið skipar fyri fyrilestri í Miðlahúsinum í Vágsbotni leygardagin 22. apríl kl. 15: "Er land fyri frið politikkurin loysnin á stríðnum millum palestinar og ísraelsmenn?"

Marner av Lofti integratiónspedagogur í Ålborg Kommunu, hugleiðir út frá vitjanum sínum í Ísrael og starvsroyndum sínum millum palestinar í Danmark. Marner av Lofti er 37 ára gamal, uppvaksin í Havn. Í 1992 fór hann til Ålborg og tók pedagogprógv frá Skipper Clementseminariinum. Arbeiðir í løtuni í fólkaskúlanum í Ålborg við børnum av muslimskum uppruna. Marner er eisini tónleikari og sangari og hevur sjálvur skrivað løg. Hann fer at spæla og syngja í samband við hesa fyrilestrarløtuna. Eftir fyrilesturin verður árligi aðalfundurin í Ísraelsfelagnum.

# Røktarheim á trøðni hjá Júst Sivertsen

**Sosiala nevnd hjá Tórshavnar Býráð ætlar, at røktarheim skal byggjast yviri við Strond í Havnl á trøðni úti við Boðanes, sum býráðið keypti frá arvingunum eftir Júst Sivertsen í fjør**

RØKTARHEIM

– Sosiala nevnd hjá býráðnum hevur samtykt at mæla býráðnum til at játta 500.000 krónur til at fyrireika bygging av ellis- og røktarheimi yviri við Strond.

Hetta sigur Jógvan Arge, varaborgarstjóri á heimasíðu síni í kvøld. Hann sigur, at setast skal bygginevnd, sum í fyrsta umfari fær til setning at gera byggiskrá fyri ellis- og røktarheimið.

– Seinastu kanningarnar vísa, at stórur tørvur er á plássum á ellis- og røktarheimum í Havnar kommunu, sigur Jógvan Arge.

Í løtuni verður eitt ellis- og røktarheim til 24 fólk bygt aftrat Tjarnargarði í Stoffalág.